var undan eini ær, sum hevði lyndi at klintra. Tað er soleiðis, at tá hevur lambið tað eisini! Tað varð eisini, sum hann segði. Hesin veðrur datt oman, og hann var tann besti av teimum. Men vit fingu so tríggjar, og tað kom eisini væl við.

### Torvskurður og høsnarungar

Eg skar torv í Jarðadali. Eg var fýra dagar um arbeiðið, og eg var so móður hvønn dagin. Eg skar ársbrenni av torvi, og eg meini, at eg var einsamallur sum skar torv í Jarðadali tað árið. Tað varð so ringur terri at byrja við. Tað kom frost, og nógv torv frysti, men tað frysti kortini ikki hjá okkum. Tað var gott torv. Konan arbeiddi einsamøll torvið, tá børnini vóru smá, men torvið kom alt til høldar.

Eg hevði eisini velt so mikið nógv og gjørt klárt at seta niður. Eg hevði koyrt tøð í radini, so tað var bert at seta eplini niður og at stinga hol fyri hvørt epli við eini sneis. Soleiðis plagdi eg at gera, áðrenn eg fór burtur. Har settu vit nógv eplir niður.

Konan hevði bestilt høsnarungar úr Havn frá Jens Reinert. Eg haldi, at vit fingu seks hønur og ein hana. Sum tær vurpu! Eg gjørdi eitt høsnarhús, har tær kundu vera inni. Tær sluppu ikki út, tá kalt var. Hønan tolir ikki at verða køld um beinini. Tær vurpu til langt út á veturin, og tær vurpu væl, og konan avreiddi egg fyri fóður.

So fór hon at hoyggja í gerðinum, og tað bar hon heim á neystaloftið at byrja við. Tá var einki hús har inni. So lat hon hoyggj fyri mjólk til Poulinu, konu Kristian Gaard, sum hevði ov lítið av hoyggj. Soleiðis gekk tað, og vit kláraðu tað.

### Ófør kúgv

Vit høvdu veðrar at begynna við, men tá vit høvdu dyrkað nakað væl, fingu vit okkum kúgv. Eg haldi, at hon var úr Norðradali frá einum sum æt Simonsen. Hann hevði sett hana í bløðini. Hetta var ein kvíga, sum var kviðin. Tað var eitt vælsignað kríatúr. Hon mjólkaði so góða mjólk, men kom tó ongantíð uppum 12 litur. Men hon mjólkaði inn í mánaðin, tá hon skuldi kálva, meðan kýr vanliga vóru sleptar longur enn tað. Men hetta var nóg mikið fyri okkum. Á denn fløti, sum kom omanav mjólkini! Konan gjørdi nógv smør tá, tað var deiligt. Vit høvdu eisini gott pláss.

Tað vanliga var at hava kúgv í kjallaranum, men vit høvdu eitt fjós undir hjallinum



*Guttabrøðurnir frá vinstru: Einar, John, Meinhard, Sigurd, Jákup Kristoffur og Jákup Martin. Elibert er ikki við. Myndin er tikin í 1976*



*1963 á veg umborð í "Víking". F.v. Torbjørn Gaard, John Erling og Andrias í Tarti, Jákup Kristoffur Joensen, Hans Jacob Jensen, Jens Petur Jensen og Sofus Joensen.*

### Sjálvbrynnarin var hentur

Vit vóru annars tey fyrstu í Oyndarfirði sum høvdu sjálvbrynnara. Tað var stuttligt at kunna sita í køkinum og hoyra kúnna fáa sær vatn, meðan vit fyrr máttu fylla spannir at seta fyri hana. Vit høvdu hesa kúnna í sjey ár. Hon var geldkúgv tá, og vit seldu hana til jarðamóðrina í Fuglafirði. Ein kvígukálv seldu vit til Elduvíkar. Hesin kálvurin gjørdist ein ógvuliga góð kúgv. Vit fóru so at fáa okkum veðrar, og tað høvdu vit í nógv ár.

Eg minnist fyrsta lambið, vit keyptu at hava inni í gerðinum. Hetta var eitt lamb sum var stakt, tá tey býttu norðuri í Fjallinum. Tað var eitt lítið heystlamb, eitt gimburlamb. Kortini varð tað kviðið og lembdi sum gimbra. Sum hon bleiv ein góð ær. Hon átti lamb á hvørjum ári, og góð vóru tey eisini. Tá hon var 9-10 ára gomul, lembdi hon ikki aftur og varð tikin. Eg minnist ikki, um tað vóru 20 ella 30 merkur av tálg í henni, og kroppið vigaði 50 pund. Ein veldig ær.

### Veðrar

Hetta árið hevði eg tríggjar veðrar í gerðinum. Ein av teimum hevði eg fingið frá Poul Martini, bátasmiðinum, sum hevði garðin í Tarti. Eg minnist, at tað lambið vigaði 30 pund í lívi, so tað hevur ikki verið meira enn 12-13 pund sum krov. Tað hevði sikkurt bendilorm. Eg gav tí medisin, og tað kom at viga 39 pund tað heystið, og tað var nógv tálg í tí. Tað var óført.

So hevði eg tveir aðrar veðrar, ið eg sum heystlomb keypti frá Jógvan bónda. Teir vóru eisini ógvuliga góðir. Tað er tað besta, vit hava fingið í gerðinum, tað var tann geldærin, og teir tríggir veðrarnir, sum í hvussu er vigaðu yvir 50 pund.

### Tá vit fingu elektrisitet

Tað var áðrenn elektrisitetið kom í 1955. Vit høvdu petroleumlampu, og tær báðar døturnar Bjarnhild og Amy, sum vóru smágentur, svóvu í einari song í sunnara kamari. Eg havi altíð verið nervøsur fyri eldi, og var tað eisini tá. Tær báðar høvdu eina 8 linjurs lampu av teimum grønu. Eg hevði verið og skrúvað niður, áðrenn eg fór í song. Vit bæði, eg og Malfryd, svóvu í einum øðrum kamari. Mitt um náttina kemur tann eldra gentan við lampuni í hondini og vakir okkum, tí hon er sløknað. Eingin nekari var so svartur, sum tær vóru. Tað var eitt undur, at tær skuldu vera vaknaðar. Síðan var farið upp at koyra hurðar og vindeygu upp og so at vaska. Hetta hevur hurtað undir hjá okkum at fáa el innlagt. Árið eftir fari eg at forhandla um at fáa elektrisitetið inn.

Tummas Anthoniussen, sonur Poul Martin, hevði verið og lært hjá Leif Mohr og hevði arbeitt hjá honum. Eg eri so seinur aftur hetta kvøldið. Tá eg komi niðan, tað er um midnáttina, er myrkt inni. Eg hugsi ikki meira um tað. Men morgunin eftir frætti eg frá Ásmund Petersen, nábúgvi her, at hann hevði verið inni og sløkt lyktina, tí hann hevði sæð, at hon logaði uppundir gólvið. Hetta var ein stormking til at pumpa.

Loftið hekk fult av sildagørnum frá "Álaker", so her kundi lættliga fest í. Har vórðu vit aftur spard. Tað var forundarligt.

Nú fari eg aftur at greiða frá mínum sjólívi. Í seinasta partinum var eg komin til tíðina við "Álaker".

### "Víkingur"

Tá vit koma fram til 1960-ini er tað, at línubátatíðin byrjar, og p/f Álaker letur byggja "Víking" á Tórshavnar Skipasmiðju í 1962. Hetta var eitt nógv meira nútímans skip enn "Álaker", men tað var stævið, sum við línuskipum tá í tíðini.

Eg var øll árini við John, íroknað tvey ár við "Víkingi". Hetta línubátalívið hættaði eg mær ikki longur. So ymiskt er tað við fiskieydnu, at við "Víkingi" lá als ikki eins væl fyri hjá John sum við "Álaker". Tað varð eisini rættiliga skjótt, at "Víkingur" varð seldur av landinum. Fyrst var hann tó vaktarskip, og sigldi í 1964 tann søguliga túrin fram við fiskimarkinum við sjálvum fiskimálaráðharranum Erlendir Patursson. Jákup Martin, beiggi John, var við tá.

### Við "Hvítubjørn"

So fór eg við "Hvítubjørn", sum Kjartan Mohr eisini átti. Tað var í 1954, at Kjartan keypti "Godthaab" frá Kongaliga Grønlendska handlinum. Ætlanin var at kalla hana "Polarbjørn", men Jens Pauli í Dali bað Kjartan kalla hana Hvítabjørn, tí vit hava jú orðatakið "Sterk sum hvítabjørnin".

"Hvítabjørn" var bygd í Noregi í 1898 sum bramseglsskonnart til íshavssigling, og grønlandshandilin hevði brúkt hana til ferðamanna- og farmasigling og eisini til kanningarferðir í Eysturgrønlandi. "Hvítabjørn" hevði dampmaskinu, tá hon kom, og fyrsta árið var hon á sild, men tað gekk illa. Síðan lá hon til 1958, tá farið var til Grønlands at rógva út við bátum, og hendan fiskiskapin var hon í til 1974.

Tað vóru fýra grønlendingar við hendan túrin eg var við,